# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Miðlapallarnir eru nógvir

Vit eru á veg inn í adventina. Tíðarskeiðið frá nú av og fram til jóla er serligt, og tað verður markerað á so mangan hátt, at nú eru jólini í hondum.

Sosialurin er gamal í garði. Hetta blaðið verður borið í hvørt hús. Tað er ikki fyrsta ferðin, at hetta verður gjørt upp undir fyrsta sunnudag í adventini. Men tá ið vit líta okkum aftur um bak og taka "bestikk at situatiónini", so mugu vit bara staðfesta, at tað er ikki tann sami Sosialurin, sum hesa ferð hyggur inn á gólvið hjá lesarunum upp undir jól, sum tað áður hevur verið.

Inntil fyri ikki so mongum árum síðani var Sosialurin í gásareygum bara blaðið. Nú er blaðið partur av Miðlahúsinum. Saman við blaðnum hoyra tíðindi til Portal, Sportal og Planet, Rás 2 útvarpsstøðin og síðani menning á øðrum miðlaøkjum.

Avbjóðingin er ógvuliga stór, men vit knarra ikki. Hetta er spennandi, og vit halda eisini, at tað er mennandi. Takið er ikki bara at varðveita dygdina. Um talan ikki er um framburð, so er talan um stagnatión, og tað er bara eitt annað orð fyri afturgongd.

Vandi er í hvørjari vælferð. Hjá okkum er ein av størstu avbjóðingunum at arbeiða fram ímóti, at ymsu pallarnir lyfta og stuðla uppundir hvønn annan. Vit eru fullgreið yvir vandan, sum er, at í staðin fyri at stuðla og lyfta hvønn annan, so kann blaðið liggja undir fyri, at starvsfólkini umframt Sosialin eisini hava útvarpsstøðina, Portalin eins og Sportal og Planet at hugsa um.

Tað ræður um at finna røttu javnvágina soleiðis, at blaðið er útvarpsstøðini og portalinum at gagni og so fram vegis. Venjingin er at finna fram til, hvar henda javnvágin er at finna. Hesum arbeiða vit støðugt við. Tað snýr seg um at venja ella innprenta tilvitanina um hetta í starvsfólkini, og tað tekur tíð.

Men hetta er hugaligt. Ikki minst tá ið talan er um starvsfólk sum tey, ið arbeiða í Miðlahúsinum. Talan er um eldsálir, og tað er gott grundarlag at arbeiða út frá.

Í miðlum av tí slagnum, sum vit arbeiða við, er ein av høvuðsfyritreytunum fyri, at tað skal loysa seg og harvið bera møguleikar fyri menning við sær, at tað er gott samband millum viðskiftafólkini og fyritøkuna. Tað leggja vit stóran dent á, at tað er, og royndirnar nógvu tey seinastu árini hava víst, at hetta hevur eydnast.

Í dag liggur kalendarin til afturvendandi og vælumtóktu jólakappingina inni í blaðnum. Vit ynskja tykkum øllum góða eydnu við kappingini og eina góða advent, saman við Sosialinum og hinum miðlapallunum, sum vit standa á.

**Sosialurin**

## Skilaleysar dupultíløgur



DÁNIAL PETUR HANSEN

At vit skulu hava størri kommunalar eindir í Føroyum enn vit hava í dag, hevur fyri tey flestu verið greitt leingi.

Uppgávu- og ábyrgdarbýti hjá kommununum er í dag, og verður í framtíðini enn meira, soleiðis háttað, at neyðugt er at skipað kommunarnar í munandi størri eindir enn í dag.

Ein ávís sjálvboðin samanleggingartilgongd hevur verið, sum úrslit av hesum, men gongur sjálvbodna samanleggingartilgongin kortini alt ov seint.

Gongdin er tíanverri, í alt ov stóran mun tann, at kommunurnar hvør í sínum lagi m.a. nú skunda sær at gera íløgur av ymiskum slag, fyri at tryggja sær, at teirra krónur verða nýttar í teirra kommunu áðrenn nakra samanlegging, við tí úrslitið, at ein stórur partur av vinninginum við at leggja kommunurnar saman í veruleikanum er endaður í skeivum dupultíløgum og skilaleysum øktum rakstraríløgum. Tær mongu ósamskipaðu havna- og skúlaútbyggingarnar eru dømi um hetta.

Tann vinningur sum kundi verið vunnin við at leggja kommunurnar saman í størri eindir er tí í dag tíanverri á mangan hátt vorðin til eitt tap, ið øllum førum uppá stutt sigt.

Uppá longri sigt verður kortini talan um vinning, men neyðugt er nú at seta handling aftanfyri ætlan.

Tað at politikarar okkara á Føroya Løgtingi ikki beinanvegin settu eina rímuliga stutta tíðarfreist fyri nær tær sjálvbodnu samanleggingarnar skuldu verða framdar í seinasta lagi, hevur longu kostað okkum dýrt.

Tapini av ov veikari politiskari handlikraft hava verið nóg stór higartil, og verða størri tess longri vit ikki tora at handla, tí hevði verið best um tær neyðugu kommunalu samanleggingar vórðu samtyktar áðrenn næsta kommunuval, við lóg um neyðugt.

## Fíggjarætlan hjá Leirvíkar Kommunu

**Tíðindaskriv**
*Leirvíkar Kommuna*

Leirvíkar Bygdarráð hevur á fundi 26. november 2007 endaliga samtykt fíggjarætlanina fyri 2008.

Skattaprosentið í 2008 verður óbroytt 21% og barnafrádrátturin hækkar til 5.000 kr. fyri hvørt barnið. Foreldragjaldið í barnaansingin verður óbroytt.

22 mió. kr. eru játtaðar til íløgur. Helvtin av hesi upphædd eru íløgur, sum eru fluttar frá 2007. Her er talan um nýggjan bátahyl til smábátar, sum tað higartil ikki hevur eydnast kommununi at sleppa í gongd við. Bygdarráðið hevur í ár sett 3 mió. kr. av til nýggjan bátahyl.

Stórur tørvur er á grundstykkjum, bæði til sethús og vinnuligt virksemi, og tí hevur bygdarráðið avsett 7 mió. kr. til útstykkingar. Trupult hevur gingist at keypa festijørð og seinasta árið er jarðarprísurin mestum tvífaldaður, og hetta ávirkar eisini íløguna til útstykkingar.

Fólkatalið økist í kommununi og somuleiðis tørvurin á barnaansing. Størsta einstaka íløgan á 8 mió. kr. í 2008 fer til bygging av nýggjum dagstovni við Garð.

Í fjør var vatnveitingin í bygdini munandi útbygd og nú er túrurin komin til vinnuøkið úti á Vík, har 1,5 mió. kr. eru avsettar til nýggja vatnveiting.

Í samband við útbyggingarnar er í mongun føri neyðugt at broyta og víðka um verðandi býarskipan og byggisamtykt. Bygdarráðið hevur arbeitt við nýggjari býarskipan í meiri enn eitt ár nú, og peningur er avsettur til at gera hetta arbeiðið liðugt í 2008.

Hendan fíggjarætlanin er tann seinasta, sum bygdarráðið ger fyri Leirvíkar Kommunu, áðrenn Gøta og Leirvík í 2009 leggja saman í Eysturkommunu.

Leirvíkar Kommuna hevur í hesum sambandi játtað 2,5 mió.kr. til nýggjan umsitingarbygning í Norðagøtu.

Leirvíkar Kommuna er fíggjarliga væl fyri og bygdarráðið vónar við hesi fíggjarætlan at verða við til at økja um trivnaðin og menningina í bygdini.

***Leirvík, tann 28. nov. 2007***

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.